## Global Games í Kekkia

Global Games, sum er ein kapping fyri menningartarnað, verður í døgunum frá 5. til 13. juli. Global Games er ein samansjóðing av VM í ymsum ítróttum, og fara luttakandi íðkararnir at luttaka í frælsum ítrótti, súkkling, kurvabólti, innandurða fótbólti, svimjing, borðtennis, tennis, judo og innandurða rógving. Ragnvaldur Jensen og Kristian Martin Garðalíð umboða Føroyar í ávikavist svimjing og frælsum ítrótti. Ragnvaldur Jensen hevur áður luttikið í kappingum, har hann hevur staðið seg væl millum heimsins bestu svimjarar við menningartarni.



## Símun tapti á Malta

Símun Samuelsen og liðfelagarnir úr Keflavík royndu seg í gjár í fyrsta umfari av Europe League. Íslendingarnir vóru á vitjan á Malta, har heimaliðið Valetta FC vann 3-0. Símun Samuelsen spældi allan dystin á miðvøllinum, men tað hjálpti ikki stórvegis. Keflavík hevur tískil av álvara ryggin móti múrinum undan seinna dystinum, sum verður leiktur í Íslandi í komandi viku.



# Jóan Karl gjørdi eitt sprell

**Jóan Karl Joensen rann seg í finaluna í kappingini á 1500 metrum, og hann var væl nøgdur við tað. Í finaluni megnaði hann ikki at fylgja teimum skjótu monnunum**



eydun@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein


22 ára gamli Jóan Karl Joensen rann eina góða innleiðandi kapping á 1500 metrum í gjár.

21 rennarar vóru við í kappingini, og 12 av rennarunum kundu renna seg í finaluna. Kappast varð í tveimum innleiðandi kappingum, og Jóan Karl Joensen var við í seinnu renningini.

Jóan Karl hevði lagt eina ætlan fyri, hvussu hann skuldi renna sína kapping, og tað megnaði hann heilt væl.

Jóan Karl rann í tíðini 4.15,90, og hann endaði sum nummar 6 í sínari kapping. Tað var nóg mikið til at koma í finaluna, sum varð runnin fyrrapartin.

Í finaluni rann Jóan Karl á mál sum nummar 10 av 12 rennarum við tíðini, 4.17,68. Og tað var eitt avrik, sum kollfirðingurin ikki var nøgdur við.

- Hatta var ikki gott. Eg var eitt sindur troyttur í beinunum frá í gjár, og eg legði nokk ov hart út. Og tí orkaði eg als ikki nóg væl, tá eg rann seinasta pettið, segði Jóan Karl, tá hann var komin á mál.

### Rebekka var troytt

Rebekka Fuglø rann innleiðandi kapping á 800 metrum í gjár, men tað gekk ikki so væl hjá henni, sum tað kundi gingið.

- Eg var eitt sindur troytt áðrenn kappingina, so eg rann ikki so skjótt, sum eg kundi, segði Rebekka Fugløeftir kappingina.

Rebekka Fugløgjørdist nummar 12 í innleiðandi kappingini við 2:25,67 og kom ikki víðari til finaluna

